Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali
(Hækka upphæddina, sum landsstýrismanninum verður heimilað at brúka)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali verður § 1, stk. 2 orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi verða 94 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 13. apríl 2023 við 30-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 13. apríl 2023

stjóri

LM-065/2022